Føroyingar gerast ríkir av svenskum nethandli

Eyðbjartur Danielsen og Bogi Simonsen eru báðir við í virkseminum hjá Nature's Own í Føroyum.
Mynd: Heri á Rógvi

Svenska fyritøkan Nature's Own nýtir sokallaðan nethandil sum søluhátt. Skipanin byggir á ein framferðarhátt, sum minnir um gomlu pyramiduspølini, men fyritøkan vil ikki hava hetta heitið sitandi á sær.Tað ber til at vinna nógvan pening,og fleiri enn 400 føroyingar sigast at vera við. Sosialurin var við, tá nýggir seljarar skuldu fáast við

NETHANDIL
Heri á Rógvi

Keyp ein startpakka. Keyp síðani ein pakka afturat, og fá so tvey onnur at gera tað sama, so kanst tú skjótt vinna nógvan pening og fáa frálíka góðar vørur. Soleiðis ljóðar uppskriftin sagt einfalt.

Talan er um sokallaðan nethandil. Hetta slagið av handli er kent uttanlands, og er nú eisini komið til Føroya. Tað skal sigast, at tá tosað verður nethandil, so verður ikki hugsað um Internethandil, hóast Internetið kann spæla ein leiklut. Tað var í 1999, at hetta byrjaði í Føroyum. Eftir hvat Sosialurin skilur, so vóru tað fólk úr Norra, sum fingu fyritøkuna til Føroya. Tað, sum rennur teimum flestu til hugs, tá greitt verður frá tílíkum er pyramiduspøl. Skipanin, sum verður nýtt at selja og útbreiða vørurnar, byggir á sokallaðan »beinleiðis handil«, sum snýr seg um at beinleiðis samband millum seljarar og keyparar.

Tað er ein svensk fyritøka, sum hevur fingið nethandil til Føroya. Talan er um fyritøkuna Nature's Own, sum framleiðir og selur mest heilsuvørur. Fyritøkan varð sett á stovn í 1994 av sviunum Magnus Ahlén og Lars Múrbeck, og byrjaði fyritøkan við at nýta sama søluhátt,ið vit eitt nú kenna frá Tupperware. Hetta uppgóvu teir tó skjótt og fóru yvir til at selja gjøgnum nethandil. Fyritøkan er ikki tann einasta fyritøkan, ið nýtir henda søluhátt. Hetta slagið av handli sigst at vera sera skjótt vaksandi. So skjótt vaksandi, at nethandil, sambært føroysku seljarum, veksur skjótari enn sjálvt KT-vinnan.

Floykt

Sum áður nevnt, so er framferðarhátturin hjá Nature's Own sprotin burturúr »Beinleiðis handli« ella »direct sales«, sum tað verður rópt á enskum. Enska heitið fyri nethandil er »Network Marketing«.

Skipanin hjá Nature's Own byggir fyrst og fremst á beinleiðis sølu. Seljararnir fáa vørurnar beinleiðis frá fyritøkuni í Svøríki. Vit skulu her gera eina roynd at greiða frá skipanini:

Tá tú »byrjar« í fyritøkuni, so skalt tu keypa ein »startpakka«. Hesin kostar umleið 300 kr. Allir prísir eru upprunaliga í svenskum krónum, soleiðis at tað er eitt sindur ymiskt, hvat kostnaðurin er, tá ein í Føroyum móttekur pakkan. Hetta gevur tær rætt at keypa frá fyritøkuni, men hetta gevur tær ikki rættindi til at vera seljari ella »distributør«, sum eitur á fremmandamáli.

Fyri at gerast seljari, og harvið fáa møguleikan at vinna pening, so skalt tú keypa antin ein singul ella ein trippel pakka. Singel pakkin kostar uml. 1800 kr., og trippel útgávan kostar umleið 3500 kr.

Tað er eftir at hava keypt ein av hesum pakkunum, at tú fært møguleikan at vinna pening burturúr. Lykilin til at vinna pening er at fáa onnur at koma uppí. Fært tú tvey onnur at koma uppí, so fært tú 504 kr. frá fyritøkuni. Hesi skulu sjálvandi eisini keypa sær ein singul ella trippel pakka, soleiðis at hesi aftur finna tvey afturat, og hesi fær tann upprunaligi persónurin eisini pening fyri. Tað ber í veruleikanum til at vinna nógvar túsund krónurnur um vikuna, men hetta krevur eisini, at tú er virkin. Skipanin er eitt sindur floykt, men tað snýr seg í roynd og veru um at fáa fleiri at gerast seljarar. Tey bæði fyrstu, sum hesin fyrsti spyr umboða hvør sítt bein. Peningurin, sum hesin fyrstu fær verður givin eftir, hvussu røsk hesi bæði beinini eru at selja og keypa. Tað er nemliga soleiðis, at fyri at vera verandi í skipanini, so skalt tú keypa vørur fyri einar 700 kr. um mánaðin. Hetta er treytað av, um ein hevur keypt ein singul ella trippel pakka. Hvørt einkult keyp gevur síðani teimum omanfyri ein bonus stig. Alt eftir, hvussu nógv fólk eru undir tær, og hvussu nógv hesi somu keypa, so kanst tú vinna pening fráNature's Own.

Tað mesta, sum tað ber til at vinna burturúr eru umleið 9240 kr. um vikuna við hesum góðu tveimum beinunum. Fert tú víðari og fær tær eitt »triðja bein«, so ber til at vinna enn meira pening. Og sjálvandi ber tað eisini til at vinna enn meiri pening, um tú fær tær eitt fjórða, fimta..... bein.

Fáa seljarar

Henda dagin, sum Sosialurin var og kunnaði seg um Nature´s Own, varð skipað fyri einum lítlari samkomu, har endámálið var at fáa nýggjar seljarar, umframt at kunna blaðmannin um virksemið.

Við borðið sita fýra menn, sum allir eru væl við í nethandlinum í Føroyum, ein komandi nýggjur limur og blaðmaðurin.

Greitt verður frá fyritøkuni, beinleiðis handli og vørunum. Tað trýtur ikki við lovandi orðum. Søluevnini bila als einki hjá hesum monnum. Heldur floykta skipanin, sum roynt er at endur geva omanfyri, verður frágreidd, og tað er heldur ikki líkatil at fanga, hvussu hetta hongur saman. Sagt verður, at fyritøkan virkar fyri betri heilsu. Vørurnar eru gjørdar úr natúrligum evnum einans. Talan er fyrst og fremst um heilsuvørur, men fyritøkan er eisini farin undir at framleiða vørur til bæði bil, bát og hús.

Smyril lá sum negldur

STRANDFERÐSLA
Áki Bertholdsen

– Tekniskt brek hevur aftur loypt ólag á ferðaætlanina hjá Strandferðsluni. Enn er óvist, nær brekið verður umvælt, men so leingi tað ikki er umvælt, fær Smyril ikki flutt treylarar

At Smyril er gamal og illa slitin kemur oftari og oftari til sjóndar.

Oftari og oftari kemur fyri, at teknisk brek umborð á Smyrli loypa fløkju í ferðaætlanina.

Aftur í gjáramorgunin var galið.

Tá íð Smyril skuldi loysa á Drelnei klokkan sjey í gjáramorgunin, fekst hekkuportrið ikki upp og Smyril slapp tí ongan veg.

Manningin varnaðist skjótt, at tað vórtu tey bæði stemplini, sum draga portrið upp, sum vóru boygnað.

Ófantaligt veður var í fyrrakvøldið og um náttina og nógvur suður var í sjónum. Okkurt var gingið fyri í stemplunum, so at tey sótu føst ístaðin fyri at arbeiða upp og niður við skipinum. Tí boygnaðu tey og portrið fekst ikki at ganga.

Skiparin boðaði frá, at tað fóru at ganga fleiri tímar at fáa stemplini av, so at portrið kundi hiavast upp og tí valdu tey allarflestu av ferðafólkunum at fara í land aftur.

Smiðir vórðu síðani boðsendir at taka stemplini av.

Ætlanin var so at sáa hiva portrið upp, so at Smyril fekk siglt til Havnar, har brekið so skuldi kannast og umvælast.

Tað seinasta, vit vistu, áðrenn evstamark á miðdegi í gjár, var, at Smyril skuldi sigla av Tvøroyri klokkan 13.

Ætlanin var at taka farm og bilar inn ígjøgnum síðuportrið.

Men treylarar ber ikki til at fáa ígjøgmum síðuportrið og tað fer at elva til stórar trupulleikar í dag, tí hósdagur er dagurin, tá ið allur fiskurin, sum er virkaður á flakavirkjunum í Suðuroy, og sum skal av landinum, skal flytast til Havnar og umborð á Norrønu.

Magnus Magnussen, teknikskur leiðari á Strandferðsluni, er heilt vísur í, at tað fer ikki at eydnast at fáa portrið í lagi til í dag.

Á miðdegi í gjár var tí enn óvist, hvussu verður við fiskaflutninginum, men hann sigur, at málið verður kannað.

Lagnurnar speiðsemi var tað, at umborð á Smyrli hendan túrin, vóru bæði løgtingsmenn og onnur, sum skuldu til Havnar, á kunningarfund hjá Strandferðsluni og Vinnumálatýrinum um ætlanina at byggja nýggja Suðuroyarferju.

Tað, sum hendi í gjáramorgunin undirstrikar, at tað hevur skund at fáa skipið bygt, tí teknisk brek, sum hetta, tolir eitt framkomið samfelag ikki.

Sleppa undan svansi

– Nú skal ongin evja longur renna frá lastunum hjá Strandferðsluni, tá ið fiskur verður fluttur ímillum tey ymsu plássini

Nú skal evja ikki longur renna á vegirnar og á dekkið á bilaferjunum, tá ið Strandferðslan flytir fisk

UMHVØRVISVERND
Áki Bertholdsen

Evja, sum rennur úr lastini á bilum, sum flyta fisk, hevur í nógv ár verið til stórt fortreð hjá fólki, sum koyrir í bili, ella ferðast við ferjunum hjá Strandferðsluni.

Hendan evjan hevur dálkað ógvuliga illa frá sær. Vegirnir verða út av lagi skitnir og tað fer illa við bilunum, sum koyra eftir teimum og ger teir nógv skitnari enn neyðugt.

Men óskilið á biladekkunum á ferjunum hjá Strandferðsluni hevur verið til minst líka stóran ampa, tí fólk sleppa ikki undan at ganga og tvassa uppi í evjuni, sum rennur úr treylarum og setir seg bæði á skógvar og á klæðir. Av biladekkinum verður evja og luktur borin runt inn í ferðafólkahølini umborð á skipunum og er til stóran ampa hjá ferðafólki.

Strandferðslan hevur leingi verið varug við trupulleikan og nú er ein loysn á veg, so at tað slepst undan hesum trupulleikanum.

Heini á Borg, sum hevur við farmaflutning á Strandferðsluni at gera, sigur, at Strandferðslan er nú í ferð við at broyta treylaralastirnar soleiðis, at onki skal renna úr teimum.

– At sevja rennur frá fiskinum, slepst ikki undan. Men nú eru vit farin at gera treylaralastirnar púra vatntættar. Ístaðin hava vit gjørt frárensl við vatnlási á, í lastin. Eitt frárensl er í hvørjum horni á lastini, har øll sevjan síðani rennur og verður veitt í tangar undir lastini, sigur Heini á Borg

Hvør tangi tekur 60 litrar og hann verður síðani tømdur á góðkendum staði. Heini á Borg sigur, at teir hava bygt nakrar lastir um og at tað riggar sera væl.

– Har, vit hava bygt lastirnar um, er trupulleikin við frárensluvatninum loystur, sigur hann.

Hann sigur, at Strandferðslan fer at broyta allar lastirnar so við og við og teir vóna at vera liðugur við arbeiðið einaferð næsta ár.

– Ein trupulleiki er, at tað eru so nógvur fiskur at flyta, at tað ber ikki til at taka ov nógvar lastir úr rakstri ísenn, og av tí sama tekur arbeiðið eitt sindur av tí, sigur hann.

Ein annar trupulleiki er, at ein vanlig kølaratreylaralast er fýra metrar høg, men biladekkið á Smyrli er bara 3,97 metrar høgt og tað ger tað alt meiri tvørligt. Heini á Borg sigur, at tað er avmarkað, hvat tað loysir seg at brúka av peningi til amboð, sum passa til Smyril.

Fleiri og fleiri

Nature's hevur í longri tíð verið virkið í nógvum londum. Serliga í Norra vakti fyritøkan og framferðarhátturin ans hjá fjølmiðlunum. Millum annað varð nógv skrivað um, at norskir løgreglumenn vóru farnir uppí virksemi hjá fyritøkuni, og tað vildu myndugleikarnir steðga, men løgreglumenninir noktaðu fyri hesum.

Talið, sum varð lagt fram á samkomuni hetta kvøldið, er 400. Hetta er talið á føroyingum, sum eru við í felagnum. Hetta tal er tó óváttað. Virksemið hjá Nature's Own í Føroyum veksur eftir øllum at døma skjótt, og tey, ið longu eru virkin stríðast eisini fyri at fáa fleiri fólk við. À samkomuni hetta kvøldið verður eitt pappír lagt fram, sum vísir at »umboðini« hjá Nature´s Own í Føroyum ikki skulu gjalda meirvirðisgjald. Hetta verður eisini lagt fram fyri at vísa á, at talan er um lógligt virksemi. Bæði í Føroyum og uttanlands stríðast umboðini hjá Nature's Own at beina fyri ákærunum um pyramiduspæl.

Eisini hetta kvøldið verður ákæran um pyramiduspæl víst aftur, og teir vísa á, at teir hava fingið gott orð fyri, at hetta er fult lógligt í Føroyum.

À samkomuni hetta kvøldið kom ein nýggjur uppí. Síðani eru enn fleiri komin afturat.

Gera brimgarð á Strondum

BRIMGARÐUR
Áki Bertholdsen

Nú fer Sjóvar Kommuna undir at gera brimgarð á Strondum.

Talan er um einar 100 metrar av brimgarði, sum skulu gerast frá bátahylinum, út á Langanes.

Eivind Jacobsen, borgarstjóri, sigur, at arbeiðið kostar 700-800.000 krónur at gera.

Kommunan hevur áður fylt eitt stórt stykkið upp og brimgarðurin má gerast fyri at alt ikki skal skola útaftur.

Stykkið, sum er fylt upp, er einar 5.000-6.000 fermetrar og tað kann brúkast til onkur endamál, eitt nú ídnaðarvirki, um áhugi er fyri tí. Tað er ikki slættað, og tað verður tað heldur ikki, fyrrenn onkur hevur brúk fyri tí.